# AaB tapti í Herning

Tað hevur ikki gingið so væl hjá AaB síðstu dystirnar. Í síðstu viku tapti liðið 5-0 fyri Randers, og tí bleiv tað mett at vera eitt gott úrslit, tá liðið fekk 1-1 á útivølli ímóti Horsens um vikuskiftið. Í gjár vóru teir so aftur í eldinum, tá teir spældu á útivølli ímóti FC Midtjylland. FC Midtjylland legði seg á odda 2-0 við tveimum skjótum málum miðskeiðis í fyrra hálvleik, og tí var málið hjá Nomvethe móti dystarenda ikki nokk fyri AaB at tryggja sær stig. Dysturin endaði nevniliga 2-1. Jón Rói Jacobsen byrjaði í miðverjuni hjá AaB, meðan Súni Olsen byrjaði á beinkinum.



# Gomez ársins leikari í Bundesliguni

Farligi áleyparin hjá týska felagnum VfB Stuttgart, Mario Gomez, bleiv í gjár valdur til ársins spælara í Bundesliguni síðsta kappingarár. Hann var ein av heilt stóru profilunum á liðnum hjá Stuttgart, sum vann týska. 22 ára gamli Gomez fekk 196 atkvøður í atkvøðugreiðsluni hjá Kicker, og hann endaði framman fyri Diego hjá Werder Bremen og týska veteranin Bernd Schneider hjá Bayer Leverkusen. Tað eru týskir ítróttarskrivara, sum hava valt ársins leikara. Leggjast kann afturat, at venjarin hjá Stuttgart, Armin Veh, gjørdist ársins venjari.

# Málið má takast upp

**Óli Holm, formaður í FSF, sigur, at starvsnevndin hevur tosað um hendingina í Vági seinasta sunnudag, tá VB/Sumba-venjarin sló leikara hjá EB/Streymi, og teir fara at heita á Aganevndina um at taka málið upp**

FÓTBÓLTUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Formaðurin í Fótbóltssambandinum er júst komin aftur av uttanlandsferð, og tí hevur hann ikki enn sæð myndirnar, ið vórðu vístar í 3-2 mánakvøldið, tó at hann hevur sæð hendingina á portalinum.

Men sambært formanninum í FSF er grundarlag hjá starvsnevndini at taka málið upp til viðgerðar, og tað varð gjørt í morgun.

- Starvsnevndin hevur ongar møguleikar sjálv at taka nakra avgerð í slíkum málum. Vit kundu staðfesta, at eingin kæra fyrilá, og einki í frágreiðingini frá dystinum vísti ítøkiliga til hendingina, og tí er tað upp til starvsnevndina í FSF, um hon tekur málið upp ella ikki, sigur Óli Holm.

Men formaðurin vísir samstundis á, at starvsnevndin ongar sum helst heimildir hevur at gera nakran úrskurð í málinum.

- Starvsnevndin kann bert heita á ella ikki heita á Aganevndina um at taka málið upp. Vit hava so í hesum førinum valt at heita á Aganevndina um at taka málið upp við viðgerðar, sigur Óli Holm.

Avgerðin varð sum nevnt tikin í morgun, so Aganevndin hevur ikki fingið skrivið um hetta enn, men tað er á veg, sambært formanninum í FSF.



*Óli Holm, formaður í FSF, sigur, at starvsnevndin hevur heitt á Aganevndina um at taka hendingina, har venjarin hjá VB/Sumba sló EB/Streyma-leikara í andlitið, upp til viðgerðar*

## Lunkað støða

VB/Sumba hevur í tíðindaskrivi í morgun eisini boðað frá, at teir hava viðgjørt málið, og eru komnir til sættis við venjaran um hendingina. Nevndin hevur avgjørt at revsa venjaran, men vil ikki upplýsa á hvønn hátt.

- Vit hava revsað venjaran upp á okkara egna máta, men vit vilja einki siga um, hvat hetta inniber, hvørki nú ella í komandi tíðum, sigur Bjarni Johansen, formaður fyri felagsliðnum.

Hann sigur eisini, at hvør revsingin hjá VB/Sumba er móti venjaraum, hevur einki við FSF at gera.

Eisini Rólant Højsted er rættiliga lunkaður í sínum úttalilsum. Hann váttar, at EB/Streymur ikki hevur sent nakra kæru um hendingina, og at hann sjálvur ikki veit nágreiniliga, hvat fór fram.

Rólant Højsted upplýsti eisini fyri Sosialinum í gjár, at leiðslan í felagnum hevði kannað hendingina, men hetta hevur so verið uttan at tosa við høvuðspersónin sjálvan, Hans Paula Samuelsen, tað váttaði leikarin fyri Sosialinum.

So bæði feløgini tykjast nøgd við ta framferð, ið sýnd varð á vøllinum á Eiðinum í Vági sunnudagin. Spurningurin er so, um FSF og fótbóltsføroyar eisini kunnu liva við tí.

**Máltindurin**

formuladeildin

| | | |
|---|---|---|
| Amed Sylla Davy | B36 | 12 |
| Paul Clapson | KÍ | 10 |
| Clayton Soares | B71 | 9 |
| Anderson Castilho | NSÍ | 9 |
| Rógvi Jacobsen | HB | 8 |
| Fróði Benjaminsen | B36 | 7 |
| Súni Fríði Barbá | AB | 6 |
| Pól Jóhannus Justinussen | GÍ | 6 |
| Jákup á Borg | HB | 6 |
| Birgir Jørgensen | VB/S | 6 |
| Magnus Olsen | B71 | 5 |
| Arnbjørn Hansen | EB/S | 5 |
| Gunnar Nielsen | KÍ | 5 |
| Óli Hansen | NSÍ | 5 |
| Alexander Johansen | Skála | 5 |

# Trygd og Fremad Amager samstarva

**Fremad Amager við Toda Jónsson á odda og Trygd hava undirskrivað samstarvsavtalu, sum er galdandi fyri næstu trý árini**

FÓTBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Samstarvsavtalan, sum Fremad Amager og Trygd hava gjørt, ber millum annað í sær, at Trygd kemur at standa á brókunum hjá Fremad Amager leikarunum. Eisini verður Trygd sjónligt á heimavøllinum Sundby Idrætspark og á heimasíðu felagsins.

Um avtaluna sigur Niels Juel Arge, stjóri á Trygd, at Trygd við hesum verður við til at stuðla føroyskum fótbólti sum heild.

- Fremad Amager ynskir at geva føroyskum fótbóltsleikarum, sum her heima sýna góð avrik, møguleika at royna seg uttanfyri Føroyar. Hesum hugskotinum tekur Trygd fult undir við, og tí stuðla vit ætlanini. Umframt hetta fer ætlanin hjá Fremad Amager alt annað líka eisini at styrkja føroyska fótbóltslandsliðið, og tað er nakað, ið allir føroyingar fáa gagn av.

Um alt gongur eftir vild, fer Fremad Amager at eita FC Amager eftir hetta kappingarárið, og hetta verður væntandi ein liður í at endurnýggja felagið.

- Trygd trýr upp á ætlanina hjá Fremad Amager, og vil tí gjarna verða sett í samband við felagið og ætlanirnar hjá felagnum, leggur Niels Juel Arge afturat.

Nevndarformaðurin í Fremad Amager, Todi Jónsson, fegnast eisini um avtaluna.

- Vit eru sjálvsagt sera fegin og stolt yvir, at ein fyritøka sum Trygd hevur gjørt av at stuðla okkum og ikki minst teimum trimum føroyingunum í felagnum á teirra yrkisleið. Hesir verða vónandi ein dag stuðulsleikarar á landsliðinum, sigur Todi Jónsson um avtaluna.



*Janus Thomsen, marknaðarleiðari hjá Trygd, og Todi Jónsson, nevndarformaður hjá Fremad Amager, skrivað her undir trý ára samstarvsavtalu*